## DAGSINS MEINING

# Høgtíð og onnur tíð

Páskirnar eru tann stóra høgtíðin hjá kristna partinum av mannaættini. Hendan høgtíð hevur dám av djúpum álvara og stórari gleði. Skírisdagur og Langafríggjadagur eru daprir dagar. Hesar dagar minnast kristinfólk pínslusøgu frelsarans. Mong gerast beinleiðis sorgarbundin og onnur nýta dagarnar at hugsa um teirra lív sum kristin ella ikki kristin menniskju. Í hesum døgum fyri gott og væl tveytúsund árum síðan átók ein ungur maður sær at líða alla heimsins neyð og pínu fyri at mannaættin skuldi verða frelst.

Páskamorgun reis Jesus upp frá deyðum og tí hevur Páskadagur annað lag. Hesin dagur verður um allan tann kristna heimin hildin sum ein sannur gleðisdagur, hóast døpur skýggj hanga yvir heiminum. Í heimlandi Jesusar, Palestina, er ófriður. Hatur og ótti valda millum manna. Illstøðan millum jødar og arabar bert stendur við og versnar. Her er eingin bróðurligur andi at hóma enn minni er útlit fyri varandi friði. Líta vit okkum kring heimin er støðan lítið mætari. Í Afghanistan, Iraq, Srilanka og Sudan valdar støðugt stríð. Hungur og hjall, sjúkur og náttúruvanlukkur eyðkenna myndina av stórum parti av heiminum í dag. Eftir høgtíðina kemur ein onnur tíð ella kundu vit sagt gerandisdagurin. Kanska kundu vit nýtt halgidagarnar til hugs um, hvussu vit kunnu sýna ábyrgd mótvegis teimum líðandi menniskjum, sum vit møta dag og dagliga gjøgnum fjølmiðlarnar.

Um okkara leiðir hevur leingi valdað friður, vælferð og trygd, men ivasamt, um henda støða fer at standa við. Yvirgangurin nærkast okkara parti av Heiminum og valdsgerðir og harðrendur brotsmannayvirgangur herjar í hesum døgum okkara næstu grannar. Ikki løgið at mong stúra, øtast og spyrja, hvat alt hetta endar við. Tað tykist, sum hatur og agg valda millum stórar partar av mannaættini heldur enn tann góði tokki, sum er ein kjarnan í kristna boðskapinum. Hetta er mikið spell og hetta hatur setur alla mannaættina í vanda. Hetta eiga vit øll at hugsa um. Tað er legalt at fólk eru ósamd um politikk, hugmyndir, heimspeki, samfelagsins innrættan og býtið av tí ágóða, sum landsins vinnulív kastar av sær. Tað er samstundis av størsta týdningi, at vit ikki lata okkara heimligu ósemjur føra til hatur, men eiga vit framvegis at skifta orð um okkara ósemjur á ein siviliseraðan og kristiligan hátt. Tíbetur er hetta sum heild eydnast til hendan dag, hóast tónin mangan er hvassur, og vónandi fer hetta at eydnast okkum øllum framyvir eisini.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Støðan hjá føroyskum í føroyska útbúgvingarverkinum II

**Jeffrei Henriksen**



**annað íkast**

Bókstavirnir *a, i,* og *í* eru nógv vanligari í føroyskum enn *æ, y* og *ý*. Hesar seinnu er sostatt rímiligt at rokna sum undantøk, sum eins og *ð* einans eiga at verða nýtt, tá ið hin skrivandi veit, at teir skulu nýtast. Í øðrum førum nýta vit hinar fyrru bókstavirnar fyri tey ljóð, ið hesir 6 bókstavirnir umboða. Í ivamálum eru lærari, rættskrivingar-orðalisti, orðabøkur og mállærur til hjálpar.

Í eini orðateljing og rættskrivingarkanning í barnastílum í 1950'unum varð funnið, at vanligastu æ-orðini vóru *mær, tær, sær, væl, ær, spæla, næstan, rætt*; vanligastu y-orðini vóru f*yrr, fyri, fyrst, fylgdu, yvir, hyggja, bygd*. Hesi orðini kunnu børn í enda á 3. skúlaári læra sum reksu. Læra tey síðan í 6.-7. flokki umljóðini, at *á* er skylt við *æ* (g*á*s - g*æ*s), at *u* og *o* eru skyld við *y* (s*o*rg - at s*y*rgja), at *ú* og *ó* eru skyld við *ý* (br*ó*ta - br*ý*tur), so er væl sloppið. Innímillum kunnu tey læra onnur orð sum t.d. *bræv* og *træ*. Sjáldsomum orðum sum *girða/gyrða, syll* o.s.fr. er óneyðugt at gera nógv burturúr. Tann, sum dugir at nýta tílík orð, man eisini duga at finna, hvussu tey stavast.

Men miðvís framhaldandi undirvísing í rættskriving sum øðrum eigur sjálvandi at vera upp ígjøgnum alla skúlaskipanina!

Um 12-13 ára aldur verður ítøkiliga lært annaðhvørt, at tá ið vit kunnu seta orðið '*hitt*' frammanfyri, ella tá ið vit kunnu seta "bátur*in*/bát*in*" í staðin, skal hvørki-kyns-orð enda við -ð, og at tá ið vit kunnu seta *døma/dømt* í staðin fyri, enda sagnorð (í ivamálum) við ávikavist -a (sum '*døma*') ella við *-ið/-að* (fyri '*dømt*'). Harafturat má lærast (um 13-14 ára aldur), at boðsháttur í *fleirtali* endar við *-ið*. Aðrar bend-ing-ar-endingar við *-ð* eru ikki í føroyskum.

Men harumframt má í 8.-10. flokki og aftur í miðnámsskúlunum verða gjørt greitt, hvat ið *innihaldsligi munurin* er á bundnum og óbundnum navnorðum og á navnhátti og lýsingarhátti og tí torføra luttøkuháttinum ("hevur/kundi *herjað*" - mótvegis "kun-di *herja*," navnhátti. - Men her kann '*døma/dømt*' framvegis brúkast!). Hetta og annað slíkt í fram-halds-deild og miðnámsskúlum *ikki bert til at vita, um vit skulu skriva ð ella ikki, men til at fata málsligan bygnað.*

Í talaðum máli kunnu vit á máltónanum (*intonatiónini*) hoyra so mangt, sum ikki altíð líka greidliga kemur fram í skrift. Men har kann m.a. ymisk stavseting gera munin.

Heðin Brú kom á Skálatoftir og sá har valla tún, skrivaði onkur. Men tað var ikki so. Hann sá og legði til merkis. Tað, sum hann sá, vóru vallað tún. Og tað er ikki rættiliga tað sama.

Skal nøkur broyting gerast í føroyskum, sum nú aftur hugur tykir vera til, so kundi eg skotið upp, at hon verður tann, at hereftir verður álagt øllum, sum undirvísa í ella á føroyskum, í **lesing** einfaldliga at nevna bókstavin <a> við sínum rætta føroyska navni, /ea/, og somuleiðis <y> við sínum rætta navni, /i/, og harnæst **í skriving** skila til, at *æ, y* og ý eru "seinna /ea/" - "seinna /i/" og "seinna /ui/."

Men skal hetta gerast veruleiki, so er neyðugt, at foreldrini eru við.

**Uppískoyti**

Tað skerst ikki burtur, at tey, ið eru von at nýta føroyskar máliskur og duga og eru von við at at orða seg væl á føroyskum, hava meir ella minni lyndi til at at blanda før-oyskar máliskur og orðingar uppí, tá ið tey skulu orða seg á donskum, - og øvugt: hjá teimum, ið eru von við og duga væl at orða seg á donskum, hava danskar orð-ing-ar lyndi til at sníkja seg inn í tað føroyska. Tað sama, um tú dugir málini væl ella illa, so trokar tað málið á, sum tú helst nýtir (í talu, skrift og lesnaði).

Funnist verður - og tað ikki uttan orsøk - at málinum í fjølmiðlunum. Mest sum ein treyt fyri fyrstarætti at sleppa framat har, er tað at hava danska journalistútbúgving. Ein treyt fyri at sleppa inn á journalistaskúlan er at duga væl danskt. Nakað síðan frættist, at fleiri umsóknir vóru úr Føroyum at verða upptikin har, og at skúlin valdi tey 6 burturúr, sum dugdu best danskt.

- Hvørjar eru niðurstøðurnar av øllum hesum?

- Kunnu okkara politikarar av illum kanska fáa avtalu í lag um aðrar upptøkutreytir fyri føroyingar?

# Nýggj nevnd í Parkinsonfelagnum

AÐALFUNDUR
*Tíðindaskriv*

Parkinsonfelagið hevur havt aðalfund og valt nýggja nevnd. Nevndin hevur skipað seg við Kristinu Vesturklett sum formanni, Onnu Mariu Poulsen, sum næstformanni, Barbaru á Tjaldrafløtti sum skrivara, Hildebjørg Weihe sum kassameistar og Janu Ziska. Varalimir eru Anna Berg og Gunnhild Petersen.

Parkinsonfelagið varð stovnað í februar í 1990 og hevur m.a. til endamáls:

- at betra viðurskiftini hjá parkinsonsjúklingum
- at veita upplýsing um sjúkuna
- at veita stuðul til gransking
- at luttaka í norðurlendskum og altjóða samstarvi.

Felagið skipar av og á fyri tiltøkum, og lýst verður tá í bløðunum.

Felagið hevur 135 limir. Ilt er at siga júst hvussu nógv fólk í Føroyum hava parkinsonsjúkuna, men mett verður, at talan er um umleið 100 fólk.

Sjúklingar og avvarðandi kunnu seta seg í samband við felagið gjøgnum MBF-húsið, Íslandsvegur 10 ella við at seta seg í samband við onkran av nevndarlimum felagsins.


Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo

Durita Simonsen durita@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Jón Brian Hvidtfeldt jonbrian@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Páll Holm Johannesen pall@sosialurin.fo
Heini í Skorini heini@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard ave@post.olivant.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 228909
e-post: vilmund@sosialurin.fo
**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.




# Vantandi samskipan og peningur til gransking

**– Hóast dentur verður lagdur á gransking í samgonguskjalinum, og dúgliga varð lovað at menna gransking undir valstríðnum, er talan um eitt stórt vónbrot, nú fíggjarlógin borðreiðir við skerjingum til granskingararbeiði, sigur fiskivinnufrøðingurin Egil Olsen, stjóri í privatu fyritøkuni Faroe Marine Biotech**

GRANSKING
*Heini í Skorini*
*heini@sosialurin.fo*



*– Ein miðsavnan av gransking í Føroyum hevði eftir mínum tykki ikki verið av leið, og tað er tað, vit síggja í londunum kring okkum, sigur Egil Olsen, granskari og stjóri í fyritøkuni Faroe Marine Biotech*

– Spyrt tú politikaran, sigur hann eftir øllum at døma, at tað skal nokk koma í 2005, men sannleikin tykist vera, at viljin at menna granskingararbeiði ikki er til staðar hjá politiska myndugleikanum, sigur fiskivinnufrøðingurin Egil Olsen, sum í tvey ár hevur granskað í menning av hjáframleiðslum og biotøkniskum úrdráttum í privatu fyritøku hansara, Faroe Marine Biotech.

Egil Olsen er eins og aðrir granskarar kring landið vónbrotin um fíggjarlógaruppskotið fyri 2004, sum í stóran mun hevur skert játtanir til gransking munandi.

### Íslendingar og ES vilja samstarva

Egil Olsen, sum í 15 ár hevur arbeitt í fiskivinnuni og havt leiðarastørv t.d. sum stjóri á flakavirkinum Norðís, Tvøroyrar Flakavirki og Sandoy Seafood, metir, at skerjingar á granskingarøkinum fara at kosta føroyska samfelagnum uppá longri sikt.

– Fyrst og fremst er eingin samskipan á økinum, og í løtuni fara nógvar smærri granskingarverkætlanir fram spjaddar ymsastaðni í landinum uttan yvirornaði endamál, og uttan nakað politiskt tamarhald á økinum kemur lítið ítøkiligt burturúr, heldur Egil Olsen, stjóri.

Hann nevnir eins og stjórin í Granskingarráðnum gjørdi í blaðnum í gjár, at Føroyar als ikki eru førar fyri at samstarva við onnur lond, tí neyðugi peningurin ikki er tøkur.

– T.d. hava vit fingið fyrispurningar og havt samband við íslendingar, sum fegnir vilja samstarva, men vit hava einfalt ikki umstøðurnar og peningin til henda risamøguleika, greiðir Egil Olsen frá. Eins og við íslendingum hava teir eisini mugu takka nei til samstarv og luttøku í ES høpi, tí peningaliga støðan ikki loyvir teimum at vera við í altjóða granskingararbeiði.

### Politiskar kávalótir

Egil Olsen er serliga vónbrotin av fíggjarlógaruppskotinum, tá havt verður í huga, hvussu nógv uppmerksemi gransking hevur fingið bæði í valstríðnum í januar mánaði og í sjálvum samgonguskjalinum.

– Men tá peningur endiliga skal játtast, tykist politiski viljin ikki vera til staðar, tí talan er í størstan mun um skerjingar til føroyska gransking, heldur Egil Olsen. Hann eftirlýsir samskipan og miðvísan langsiktaðan granskingarpolitikk, í staðin fyri at granskarar hvør í sínum lagi sita spjaddir við smærri verkætlanum, sum ongantíð gerast ískoytið til samfelagið.

– Ein miðsavnan av gransking í Føroyum hevði eftir mínum tykki ikki verið av leið, og tað er tað, vit síggja í londunum kring okkum. Saman við meiri peningi á játtanunum á fíggjarlógini er samskipan sambært Egili Olsen eitt lyklaorð, um Føroyar skulu mennast og hava møguleikan at granska á jøvnum føti við grannatjóðir okkara.

Løgmaður ger bart:

# Granskingin skal savnast

**Jóannes Eidesgaard løgmaður er samdur við ónøgdu granskarunum kring landið og sigur, at í nærmastu framtíð skal arbeiðið og játtanir til gransking savnast. – Saman við Granskingarráðnum er so ætlanum at stinga út í kortið nýggjan føroyskan granskingarpolitikk, har satsað serliga verður uppá vinnugransking, sigur løgmaður**



*– Tá vit hava funnið fram til, hvussu nógvur peningur í veruleikanum er settur av til gransking, fer samgongan við fakligum tilmæli frá Granskingarráðnum at samskipa øki av nýggjum, sigur Jóannes Eidesgaard, løgmaður*

GRANSKING
*Heini í Skorini*
*heini@sosialurin.fo*

– Málið er at fáa maksimalu nyttuna málda úr føroyskari gransking, og í nærmastu framtíð skal føroyski granskingarpolitikkurin, arbeiðið og játtanirnar endurskipast og savnast, sigur Jóannes Eidesgaard í viðmerking til ónøgdsemi eftir skerjingarnar á fíggjarlógaruppskotinum til gransking.

### Dentur á vinnugransking

Løgmaður sigur, at persónar í løtuni arbeiða at útvega yvirlit og savna allar granskingarjáttanir í ymsu aðalráðunum til eina játtan, og eftir hesa miðsavnan skal nýggjur granskingarpolitikkur stingast út í kortið í samráð við Granskingarráðið.

– Tá vit hava funnið fram til, hvussu nógvur peningur í veruleikanum er settur av til gransking, fer samgongan við fakligum tilmæli frá Granskingarráðnum at samskipa øki av nýggjum, sigur Jóannes Eidesgaard.

Løgmaður leggur dent á, at granskingararbeiðið í løtuni er alt ov sundurskilt, og tískil skulu færri men størri verkætlanir í gongd við serligum atliti til vinnugransking, eitt nú á fiskivinnuøkinum, har nógv er at fara eftir.

– Tað sita eldsálir kring landið og granska, men hetta er í stóran mun frívilligt arbeiði. Tískil er neyðugt at fáa privatu vinnuna inn í granskingararbeiðið við peningaligum stuðli, heldur løgmaður. Hann sipar í hesum føri til dømi úr oljuvinnuni, har fyritøkur hava latið pening til førleikamenning á økinum.

– Í løtuni er alt ov lítið samband millum granskarar og vinnuna, og tað er tí eisini ein høvuðsuppgáva okkara at samskipa hetta av nýggjum, heldur løgmaður. Spurdur, um granskingararbeiðið ikki er óattraktivt hjá privatu vinnuni, tá so lítið verður játtað til gransking, er løgmaður greiður.

– Vit hava sum kunnugt eitt hall á 277 milliónir, og flest øll øki eru skerd á ársins fíggjarlóg, eins og gransking er skerd, og hetta slepst ikki undan í hesum døgum. Men vit fokusera alt ov nógv á pening í staðin fyri at kanna, hvat vit fáa burturúr gransking við tí peningi, vit nú einaferð hava at nýta, sigur løgmaður.

Jóannes Eidesgaard sigur, at í staðin fyri at hvørt aðalráð fær játtað pening til ymsa gransking, skal øll játtanin nú savnast og betri yvirlit fáast, og so verður farið undir at broyta føroyska granskingarheimin við nýggjum bygnaði, størri verkætlanum og samstarvi við vinnuna.